## VEÐRIÐ




**Veðrið mikudagin**
Vestan, 5 til 10 m/s, sum so líðandi veksur upp í 13 m/s. Skýggjað og turrveður. Mikunáttina møguliga regn. Hitin millum 6 og 10 stig.




**Veðrið skírisdag og langafríggjadag**
Útnyrðingur og vestan, undir 8 m/s. Skiftandi skýloft við ælaveðri. Hitin millum 3 og 9 stig.




**Veðrið páskaaftan**
Landsynningur sum so líðandi snarar í ein útsynning, 8 til 13 m/s. Yvirskýggjað við regni. Hitin millum 6 og 10 stig.

Miðvikan í morgin - eitt 75 ára minni:

# Immanuel og Laura ganga burtur

**Í Miðvikuni í morgin fara vit at greiða frá hendingini, tá sluppirnar Immanuel og Laura gingu burtur**

*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*



Náttin millum 9. og 10. apríl 1932 man vera ein tann daprasta nátt í Føroya søgu. Tað var eftir øllum at døma hesa náttina, at sluppirnar Immanuel og Laura gingu burtur við tilsamans 38 monnum, tá teir vóru á veg heim av Suðurlandinum. Í hesum døgum eru tískil 75 ár liðin síðan hesa døpru hending, sum vit vilja minnast hesa ferð í Miðvikuni.

Grundað á ymiskar keldur hava vit eina frásøgn um hendan sorgarleikin, sum var so stórur, at tað illa ber til at ímynda sær hann í dag. Men hetta vóru lívskorini hjá fiskimonnum og teirra avvarðandi hjá mongum, sum enn liva. M. a. hava vit frásøgn um hetta illveðrið frá tí 100 ára gamla Andrias í Tarti.

Tað vóru nógvar líknandi vanlukkur fram til miðjuna av seinastu øld, og kostaðu hesar fleiri hundrað fiskimonnum lívið. Eitt av endamálinum við at hava frásagnir sum hesar er at minnast hesar menn og eisini at vísa yngra ættarliðnum, at tann vælferð vit hava í dag, ikki er nøkur sjálvfylgja. Tað er goldið dýrt fyri hana.

Hesin dagur merkir samstundis, at Dinnufía ikki kemur hesa ferð men í komandi viku. Tað verða minst tríggir partar afturat við henni og Jógvan Sofus.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 13 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 15 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 20 |
| New York | 12 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 33 |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ






**Veðurlagið**
Eitt lágtrýst yvir Barentshavinum hvørvur eystureftir og ein tilhoyrandi kuldabrúgv hvørvur í ein landsynning. Lýggj luft nærkast Føroyum vestaneftir millum eitt eysturgangandi lágtrýst norðanfyri Ísland og eitt hátrýst sunnanfyri Ísland. Um páskirnar flytur eitt hátrýst seg í ein landsynning, og kaldari lyft við ælaveðri nærkast oyggjunum av vestri og útnyrðingi, men seinast í vikuni koma aftur brúgvaløg av útsynningi við regni og lýðku.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 1/4 kl. 06⁰⁰– 2/4. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,9°
Minsti hiti máldur í apríl: -8,7° - Mesti hiti máldur í apríl: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/4 kl. $06^{00}$– 2/4 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í apríl: 0,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

2. apríl — Fullmáni
3. apríl — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. Apr. | 08.01 | 20.19 | 07.01 | 19.19 | 07.16 | 19.34 | 10.01 | 22.19 | 11.01 | 23.19 |
| 4. Apr. | 08.38 | 20.57 | 07.38 | 19.57 | 07.53 | 20.12 | 10.38 | 22.57 | 11.38 | 23.57 |
| 5. Apr. | 09.16 | 21.36 | 08.16 | 20.36 | 08.31 | 20.51 | 11.16 | 23.36 | - | 12.16 |
| 6. Apr. | 09.57 | 22.19 | 08.57 | 21.19 | 09.12 | 21.34 | 11.57 | - | 00.36 | 12.57 |
| 7. Apr. | 10.41 | 23.03 | 09.41 | 22.03 | 09.56 | 22.18 | 00.19 | 12.41 | 01.19 | 13.41 |

| Dagur | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. Apr. | 06.16 | 18.34 | 05.16 | 17.34 | 08.16 | 20.34 | 09.16 | 21.34 | 07.46 | 20.04 | 09.01 | 21.19 |
| 4. Apr. | 06.53 | 19.12 | 05.53 | 18.12 | 08.53 | 21.12 | 09.53 | 22.12 | 08.23 | 20.42 | 09.38 | 21.57 |
| 5. Apr. | 07.31 | 19.51 | 06.31 | 18.51 | 09.31 | 21.51 | 10.31 | 22.51 | 09.01 | 21.21 | 10.16 | 22.36 |
| 6. Apr. | 08.12 | 20.34 | 07.12 | 19.34 | 10.12 | 22.34 | 11.12 | 23.34 | 09.42 | 22.04 | 10.57 | 23.19 |
| 7. Apr. | 08.56 | 21.18 | 07.56 | 20.18 | 10.56 | 23.18 | 11.56 | - | 10.26 | 22.48 | 11.41 | - |

**Tiltøk í Miðlahúsinum í apríl**



- altíð eitt tiltak miðlahúsinum

2. apríl kl. 20
**Kaj Klein**
framløgukonsert

4. apríl kl. 19
**Naser Khader**
Trúgv og fólkaræði

5. apríl kl. 15
**Bente Dalsbæk**
Millum tvær kvinnumentanir

11. apríl kl. 19
**Deyðasjúk**

21. apríl
**Javni aðalfund**

28. apríl
**Aglow**